# Tóm parkeringspláss við flogvøllin

**Starvsfólk á flogvøllinum hava trupulleikar av at sleppa av við bilarnar í arbeiðstíðini, hóast parkeringsplássini framman fyri terminalin standa tóm stóran part av degnum**

PARKERING
*Edvard Joensen*



*Fleiri parkeringspláss til langtíðarperingina standa tóm. Men niðan fyri, har básar eru merktir til starvsfólkið, er fult. Eisini av bilum, sum ikki eiga at vera har. Tískil verður eisini parkerað uttan fyri básarnar…*
*Mynd: Edvard Joensen*

**Vágar:** Tað eru framvegis fólk, ið ikki vilja gjalda fyri at fáa bilin ansaðan, meðan tey eru uttanlands og tí seta hann á tey plássini, ið annars eru ætlað starvsfólkunum á flogvøllinum.

Parkeringsviðurskiftini uttan fyri terminalin á flogvøllinum hava verið vánalig. Men nú er vaktarhald við langtíðarparkeringsplássini, sum virkar væl. Eisini er tíðaravmarking sett á plássini framman fyri terminalinum, og tað ger, at tað altíð ber til at sleppa av við bilin, um tú hevur einihvørji ørindi á flogvøllinum. Avmarkingin er tveir tímar.

Men so eru tað summi fólk, sum eftir øllum at døma halda tað vera ov nógv at gjalda eina lítla upphædd um dagin fyri at hava bilin undir forsvarligum eftirliti, meðan tey eru uttanlands.

Tey seta so bilarnar aðrastaðni. Og fleiri teirra velja at seta sínar bilar oman fyri farmaterminalin, har starvsfólkini á flogvøllinum annars hava sínar bilar standandi.

Úrslitið er so, at starvsfólkini noyðast at parkera aðrastaðni og tískil renna út í tíð og úrtíð at flyta bilar og parkeringsskivur.

Tað er órógvandi og irriterandi, siga fólk, sum arbeiða hjá ymsu fyritøkunum, sum halda til á flogvøllinum.

Tað er landsverkfrøðingurin, sum hevur ábyrgd av parkeringsplássunum uttan fyri terminalin á flogvøllinum.

Oyvindur Brimnes, landsverkførðingur, sigur, at honum kunnugt, virkar ansingin væl, eins og hann eisini hevur skilt, at tíðaravmarkaða parkeringin framman fyri terminalinum hevur havt ætlaðu ávirkanina.

Um parkeringina við farmaterminalin sigur hann stutt og greitt, at bilar, sum ikki hava ørindi har, eiga ikki at vera har. Skelti er sett upp við innkoyringa tann vegin, sum sigur frá, at bert er loyvt teimum, sum hava ørindi á økinum, at koyra inn hagar.

Landsverkfrøðingurin sigur, at tað økið hevur landsverkførðingurin avtalað við flogvallarleiðsluna at umsita.

Tað eydnaðist ikki at fáa orð á flogvallarovastan, áðrenn blaðið fór til prentingar.



*…og tá illa vil til, standa bilarnir í røðum hvør uttan á øðrum*
*Mynd: Edvard Joensen*

# Fólkaatkvøða verður í Bø í dag

**Íbúgvararnir í Bíggja Sóknar Kommunu skulu í dag siga sína hugsan um at leggja kommununa saman við Sørvágs Kommunu**

KOMMUNUSAMANLEGGING
*Edvard Joensen*



*Vegleiðandi fókaatkvøða verður í Bø um samanleggin millum Bíggjar Sóknar- og Sørvágs Kommunur í dag. Gásadalsfólk atkvøða eisini í Bø*
*Mynd: Edvard Joensen*

**Bø:** Bíggjar- og gásadalsfólk fara til valborðið í dag at siga sína hugsan um kommunusamanleggingina, lagt er upp til millum Bíggja Sóknar og Sørvágs Kommunur.

Tað hevur ikki eydnast okkum at fáa viðmerkingar frá borgarstjóranum í Bíggjar Sóknar Kommunu, Jógvani Páll Joensen. Men fólk, Sosialurin hevur tosað við, siga, at tey vænta eina javna atkvøðugreiðslu.

Tað er eitthvørt, sum bendir á, siga tey, at tað verður javnt millum partarnar, sum eru fyri og í móti samanlegging. Tey vænta ongan greiðan meiriluta. Hvørgan veg, siga tey.

Eitt mál, sum ivaleyst fer at hava stóran týdning fyri avgerðina, fólk taka, er barnaansingin. Tað er ungt fólk, sum býr í Bø, og børnini eru fleiri í tali. Bygdin er ein bygd við framtíðini fyri sær, sum tey siga her úti. Umleið 70 fólk búgva í Bø, og av teimum eru ikki færri enn 23 í skúlaaldri og yngri, so í so máta stendur væl til, siga bíggjarfólk. Í hinari bygdini í kommununi, Gásadali, er støðan øðrvísi. Har eru bara tilkomin og eldri fólk.

Eitt annað mál, sum eisini fer at vera í huganum á teimum, sum fara at greiða atkvøðu, er skattaprosentið. Skattaprosentið í Bíggja Sóknar Kommunu er lægri enn í Sørvági, so tað er møguligt, at tað fer at ávirka onkran, siga fólk, Sosialurin hevur tosað við undan atkvøðugreiðsluni.

Talan er um vegleiðandi fólkaatkvøðu, sum hildin verður í skúlanum í Bø. Umleið 90 fólk hava atkvøðurætt í kommununi.



Seyður leyp fyri bilin hjá formanni RFF's:

# Óskilið skal halda uppat!

**– At seyður hevur atgongd til landsvegin, kann verða atvoldin til álvarsligar ferðsluvanlukkur. Tí fari eg sum formaður í Ráðnum fyri Ferðslutrygd at taka hetta málið upp, so seyðurin fæst av vegnum, ongantíð ov skjótt, sigur Rúna Sivertsen, sum sjálv var úti fyri eini tílíkari hending á veg til hús hóskvøldið**

FERÐSLA OG SEYÐUR
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*



*Bóndin í Norðragøtu, Árant, noyddist av avlíva seyðin, sum leyp inn í síðuna á bilinum hjá formanninum í Ráðnum fyri Ferðslutrygd, Rúnu Sivertsen. Rúna tók hesar myndirnar*

Allir bilførarar, sum koyra eftir landsvegunum millum bygdir, munnu hava upplivað, at seyður gongur á vegnum ella knappliga – og heldur óvæntað – leypur út á vegin og fyri bilin. Ikki so sjáldan er um reppið, at óhappið hendir. Er sýnið vánaligt, og mótkoyrandi ferðsla er, kann støðan gerast rættiliga vandamikil, tá ið slíkt hendir. Er hálka og ringt sýnið, kann enda heilt galið, um tú roynir at stýra uttanum seyðin.

Sum bilførari skal tú altíð koyra eftir umstøðunum, men umstøðurnar kunnu eisini gerast so truplar, at er seyður á vegnum, er vandi fyri, at tað ringasta hendir.

Herfyri var seyður á vegnum atvoldin til ein ógvusligan samanstoyt á Tvøroyri, har ikki færri enn tríggir lastbilar og ein persónbilur endaðu í rokanum. Tíbetur hendi eingin persónsskaði, men materielli skaðin var ikki so lítil.

### Óskil!

Hóskvøldið, tá ið formaðurin í Ráðnum fyri Ferðslutrygd, Rúna Sivertsen, var á veg til hús, var hon fyri eini tílíkari hending, har ein seyður knappliga og óvæntað leyp út á vegin og endaði inni í síðuni á bilinum.

– Eg kom koyrandi eftir landsvegnum í Norðragøtu, og beint áðrenn eg skuldi snara inn á vegin niðan til Leirvíkstunnilin, leyp ein seyður niður av túninum við Plastvirkið og beint í síðuna á bilinum.

Rúna sigur, at hon var komin inn á innaru breytina, og tí var ferðin ikki so nógv, tá ið seyðurin á ein løgnan hátt leyp út á vegin.

– Tíbetur misti eg ikki tamarhaldið, men fór hendingin fram, áðrenn eg hevði sett ferðina niður, er ilt at siga, hvat kundi verið hent.

Hon sigur, at í eini átta ár hevur hon koyrt rættiliga nógv á landsvegnum millum Leirvík og Havnina, og tað er mangan komið fyri, at hon er vorðin ógvuliga kløkk av seyði.

– Eg minnist serliga ein morgun í Hósvík, tá ið ein seyður knappliga steyk fram við síðuni á bilinum. Í myrkrinum henda morgunin – við nógvari mótkoyrandi ferðslu, var eingin møguleiki at síggja seyðin. Hevði hann ikki farið aftur við bilinum, kundi stórur skaði verið hendur, tí ferðslan var so nógv, sigur Rúna.

Seyðurin, sum leyp inn í síðuna á bilinum hjá formanninum í Ferðslutrygd hóskvøldið, var so illa farin, at hann mátti avlívast á staðnum.

– Bóndin, Árant, kom framvið og skjeyt seyðin, sigur Rúna, sum hevur tikið myndirnar, vit prenta saman við hesi greinini.

### Óskilið steðgast

Rúna Sivertsen fer nú sum formaður í Ráðnum fyri Ferðslutrygd at taka málið við seyði á landsvegunum upp.

– Hetta óskilið má halda uppat, ongantíð og skjótt. Seyður á vegunum kann vera atvoldin til álvarsligar ferðsluvanlukkur, og tí má seyðurin fáast burtur av vegunum og ikki ganga og renna millum bilarnar. Hetta líkist ongum! Tað kann ikki vera rætt, at mannalív verða sett í váða, tí seyðurin partú skal ganga og mala úti á vegunum, har ferðslan er, sigur formaðurin í Ráðnum fyri Ferðslutrygd, Rúna Sivertsen.

Landsverkfrøðingurin:

# Ikki skyldu at halda seyði av landsvegnum

**– Tað gongur tann vegin, at hegn í fleiri støðum er sett upp fram við landsvegnum. Hetta er ein avtala, vit gera við teir, ið eiga hagan. Men vit hava ikki skyldu til at halda vegirnar fríar fyri seyði, sigur Oyvindur Brimnes, landsverkfrøðingur**

FERÐSLA OG SEYÐUR
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*



*– Vit hava umleið 450 kilometrar av landsvegi í Føroyum og skuldi alt verið hegnað av, hevði talan verið um 900 kilometrar av hegni tilsamans, sigur Oyvindur Brimnes, sum tó leggur aftrat, at tað er nógvastaðni á landsvegunum í dag, at seyður ikki sleppur út á vegin*

Landsverkfrøðingurin, Oyvindur Brimnes, sigur, at stovnurin, sum annars hevur ábyrgdina av landsvegnum og trygdini á hesum, hevur ikki skyldu til at syrgja fyri, at seyður ikki sleppur út á vegin.

– Vit hava ikki skyldu til at seta upp hegn, so seyðurin ikki sleppur út á vegin.

Oyvindur sigur, at landsverkfrøðingurin tó í samráð við teir, ið eiga hagan, í feiri førum hevur gjørt avtalu um at seta hegn upp við landsvegin.

– Hetta hava vit eitt nú gjørt í samband við nýgerð av vegum. Í slíkum førum hava vit gjørt ta avtalu við eigararnar, at vit seta hegnið upp og gjalda kostnaðin av hesum, tó upp til eitt vist. Síðan hava eigararnir sjálvir átikið sær at viðlíkahalda hegn og pelar.

Spurdur, hvussu stórur partur av landsvegnum er hegnaður av fyri seyði, sigur Oyvindur, at tað dugir hann ikki at meta um í eini handavending.

– Men tað er nógvastaðni, at seyður ikki sleppur út á vegin, sigur hann.

Landsverkfrøðingurin sigur, at vit hava umleið 450 kilometrar av landsvegi í Føroyum og skuldi alt verið hegnað av, hevði talan verið um 900 kilometrar av hegni.

– Hetta er eitt rættiliga langt strekkið og er ein óyvirkomilig uppgáva uppá stutta tíð. Men tað gongur tann vegin, at fleiri og fleiri vegastrekkir verða hegnaði av, soleiðis at seyðurin ikki sleppur út á vegirnar, sigur Oyvindur Brimnes, landsverkfrøðingur.